DAGSINS MEINING

Átrúnaður, har átrúnaður hoyrir heima

Tað eru nógv í føroyska samfelagnum, ið vilja gera alt til ein spurning um synd ella ikki synd. Nú eru vit eitt modernað demokrati og ikki eitt prestastýri eftir Miðeystur leisti, og tí hava vit, eins og øll lond í Vestureuropa verdsligar stjórnir.

Tað eru mong, ið hava fortreð av samkyndum. Ofta verða átrúnaðarlig atlit drigin fram til at grundgeva fyri hesum, og nógv eru leikfólkini, ið tveita um seg við bíbliuørindum fyri at grundgeva við hesum. Onkuntíð mugu tulkingarnar sigast at vera bókstaviligani sæð sum várharragud veit, men vit mugu ikki gloyma, at hetta er ikki tað, málið skal byggja á, óansæð um skil er í ella ikki. Vit tosa um eina verdsliga lóg, har fólk skulu fara oman á kommunuskrivstovuna at skrásetast í parlag fyri at fáa nøkur grundleggjandi rættindi, sosum eitt nú arvarætt eftir hvørjum øðrum. Eingin fer illa av einari slíkari lóg, og snýr hetta seg um vaksin fólk, ið ikki hava tørv á moralskum formyndarii. Mong halda av átrúnaðarligum grundum, at tað er synd, at liva eitt lív sum samkyndur, og halda hesi fólk ivalyest, at samkynd fara lúkst til tann grábeinta eftir hetta lívið. Hví hesi somu fólk, ið eftir røttum skuldu verið ímyndin av næstrakærleika so ikki kunnnu unna samkyndum at hava eitt gott lív her a foldum er ringt at skilja.

Eitt verdsligt land, har Føroyar tíbetur enn telist ímillum, kann ikki smíða landsins lógir eftir lægsta felagsnevnara, tá tað kemur til trongskygni. Pláss skal verða fyri øllum. Sjálvt okkara konservativi granni fyri sunnnan, Stóra Bretland gav samkyndum rætt til skrásett parlag í fjør.

Tað er ivaleyst gott, at vit hava eitt ríkt trúarlív her í Føroyum. Karmarnir eru eftir øllum at døma góðir hesum viðvíkjandi, og er tað øllum, ið hava slíkar interessur væl unt, at tey kunnu fara á møti o.s.fr.

Summum dámar at fara í dans, og kunnu tey eisini tað, uttan at tað er til ampa fyri onnur, og er tað eisini gott, at fólk kunnu fara til slíkt, hóast ein minniluti av fólki av átrúnaðarligum grundum heldur tað verða synd at dansa, og helst sóu eitt dansiforboð.

Føroyska forholdið til rúsdrekka er eisini soleiðis, at, um ávisar átrúnaðarligar tulkingar skuldu ligið til grund, so var fullkomið rúsdrekkabann, hóast tað var drukkið somikið nógv í Kána, at vínið gjørdist uppi.

Skrásett parlag er eitt reint verdsligt mál, og eigur man ikki at blanda átrúnað upp í henda sjálvsagda rætt hjá samkyndum at vinna sær nøkur rættindi. At so onkur tekur synd í samkyndum av átrúnaðarligum orsøkum, ti at leiðin sambært teimum førir til fortapilsi, er ein onnur søk, ið ikki eigur at blandast upp í hetta mál.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tak for klar tale!

Peter O.K. Olofson
Klaksvík

Det var tragisk men velgørende at læse den proklamation om registreret partnerskab, I – underskriverne – lod offentliggøre i Dimmalætting og Sosialurin d. 21/9-2002. Det var velgørende, at I åbent og ærligt vedgår, at I siger nej til, at samfundet fremover skal bygge på kristen grund, og derfor siger I ja til registreret partnerskab. Det er velgørende, at I åbent og ærligt siger, at I frigør jer fra f.eks. de ti bud, da ingen religiøse skrifter (herunder Bibelen) fremover, skal ligge til grund for landets lovgivning. Ærligt fremlagt hedenskab er da til at tage og føle på og til at forstå. Her fægtes der med åben pande.

Tiden vil så vise, om den hedenskab, I bekender jer til, også kommer til at ligge til grund for landets lovgivning, eller om de næsten 100 procent, der hører til en af de kristne kirker i landet, formår at fastholde lovgivverne på, at deres myndighed til at styre er gudgiven, og at ingen myndighed (kristen eller ej) har myndighed til at lovgive imod Guds vilje (Romerbrevet 13).

Uanset hvad resultatet bliver, vil enhver kristen naturligvis elske den, der kender sig draget af en af samme køn, så meget, at de ikke vil forråde dette menneske ved at sige god for synden (Rom 1,26ff; 1 Kor 6,9; osv.) men tværtimod vil støtte og styrke dette menneske i kampen mod synden.

Et lille etisk problem til sidst. I har undladt at skrive jeres adresser, og det gør, at flere af jeres læsere gang på gang kommer i tvivl om, hvem det egentlig er, der har skrevet under, da flere end den ene bærer samme navn, og derved kan andre end de faktiske underskrivere blive tillagt synspunkter, de rent faktisk ikke har.

Bláa húsið í Smærugøtu

- Byggimálið er tann bera undanførsla

Tórfinn Smith
Býráðslimur

Við Smærugøtu í Havn stendur eitt ávíst sethús millum mong onnur. Einasti munurin millum hetta eina sethúsið og hini er, at her búgva nøkur fólk, sum eru menningartarnaði. Hetta hevur fingið nakrar grannar at kæra sína neyð til býráðið, tí tey ynskja ikki menningartarnaði sum grannar. Fort verður m.a. fram, at við tílíkum grannum er vandi fyri, at søluvirði á húsunum í grannalagnum minkar.

Herfyri fór eigarin av umtalaðu húsunum undir at gera onkra broyting av innrættingini. Hetta førdi við sær, at nakrir av grannunum klagaðu um, at einki byggiloyvi var til hetta innandura arbeði. Hóast hetta ikki hevur verið vanligt praksis, verður so fyri frið skyld søkt um byggiloyvi, men tað sýnist heldur ikki at vera nóg mikið.

Sambært Dimmalætting kennir býráðsformaðurin seg um lús millum tvær negl. Sýtir býráðið bláa húsinum byggiloyvi, er ikki óhugsandi, at tey vinna eitt rættarmál, og so fær kommunan endurgjaldskrav. Gevur býráðið hinvegin byggiloyvi kann væntast, at grannarnir fara í rættin og vandi er fyri, at kommunan fær eitt endurgjaldskrav.

Soleiðis kann eitt mál tøvast upp í ein ellibita, har avvarandi myndugleiki hvørki veit sær út ella inn.

Ikki byggimál

Málið um bláa húsið í Smærugøtu hevur als einki við nakað byggimál at gera. Tað er tann bera undanførsla. Málið snýr seg rætt og slætt um, at ávísir grannar ikki vilja hava at menningartarnaði búgva í grannalagnum.

Eru vit nú komin so langt - ella stutt - at eitt grannalag skal spyrjast um ein nýggjur granni er nóg góður? Um nýggi grannin er nóg klókur, nóg ríkur, um hvørja samkomu hann gongur í, húðalit…? Fyrilit skal jú takast fyri at húsavirði í grannalagnum ikki minkar! Tá hugsað verður um hugburðin hjá grannunum, haldi eg størri vanda vera fyri at virði á bláu húsunum minkar, heldur enn virði á øðrum húsum í grannalagnum.

Tað, sum býráðið nú skal gera er at siga við eigaran av bláa húsinum, at tey skulu vera sera vælkomin at búgva í Smærugøtu, og samstundis gera grannunum greitt, at í Havn er pláss fyri øllum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Avrættið smiðin- ikki bakaran

Høgni Hoydal

Øll kenna helst klassisku søguna um smiðin, ið var deyðadømdur í eini bygd. Bygdin átti bert hendan eina smiðin, meðan fleiri bakarar vóru í bygdini. Tí gjørdi bygdafólkið av, at avrætta ein óskyldugan bakara ístaðin fyri smiðin - tí tað var mest praktiskt fyri bygdina, hóast dundrandi órættvíst.

Altíð martyrium í Føroyum

At rætta bakara fyri smið er meira reglan enn undantakið í føroyska samfelagnum. Tað eiga vit politikarar, fjølmiðlarnir og meiningsskaparar í samfelagnum sum heild ábyrgdina av. Umframt vanligt slatur og sleyg. Og tað er og verður dundrandi órættvíst.

Tey, sum hava ábyrgdina og skulu standa til svars fyri henni, sleppa sum oftast undan. Spæla martyrar og royna at fáa sympati. Tað riggar oftast so væl, at heldur verður lopið á boðberarnar fyri at fjala trupulleikarnar. Og tá tey, sum hava tikið avgerðirnar og skulu standa til svars, spæla pínslaváttar, so verður skjótt kikarin settur á tey, sum ikki hava somu møguleikar at verja seg og sleppa framat.

Eg kundi nevnt óteljandi dømi, men nevni her bert tvey mál, har farið eigur at verða eftir undirritaða og ikki eftir nøkrum øðrum.

Aðalstjórasetanin í Løgmálaráðnum

Tað fyrra er setanin av aðalstjóra í Løgmálaráðnum.

Har hevur bæði í Útvarpinum og í Dimmalætting verið sáddur ivi um mannagongdina. Men fólk, sum hava søkt starvið, og fólk í setanarnevndini, sum ger tilmælið, eru viðgjørd og hava fingið sett ymisk spjaldur á seg. Hóast tey ikki hava ábyrgdina ella eiga lut í avgerðini. Tey hava heldur ikki reellan møguleika at verja seg.

Um fjølmiðlar og fólk annars hava atfinningar ella spurningar, eigur at vera farið eftir:

1. Mær sum landsstýrismanni, ið hevur gjørt niðurstøður í tilmæli til løgmann.
2. Eftir løgmanni, sum bæði setur starvið og hevur eftirlit við embætisførslu landsstýrismanna.
3. Eftir løgtinginum, sum skal hava eftirlit við landsstýrinum og løgmanni.

At seta umsøkjarar ella onnur fólk í andglettin, er at rætta bakara fyri smið.

Skrásetta parlagið

Tað seinna málið, eg vil nevna, er spurningurin um skrásett parlag.

Eg havi reist málið sum landsstýrismaður í lógarmálum, tí eg haldi tað verða grundleggjandi fyri okkara samfelag og avgerandi fyri eitt sjálvstøðugt fólk og land, at øll hava rættartrygd. Uttan mun til, hvussu tey eru skapt, teirra sannføring, ella hvussu tey velja at liva - bert tey ikki gera seg inn á onnur og rættartrygd teirra.

Hesi sjónarmið haldi eg fast við og vil grundgeva og arbeiða fyri sjónarmiðunum mótvegis teimum mongu atfinningunum.

Men tað er dundrandi órættvíst, at hetta mál nú verður brúkt til at leggja eftir teimum samkyndu. Nú verður í orðaskiftinum aftur lagt eftir einum minnilutabólki, ið onki hevur gjørt nøkrum og sum ikki fær vart seg ella sleppur framat. Heldur enn at viðgera sjónarmiðini, sum eg í hesum føri havi reist, og sum allir politikarar eiga at kunna viðgera og taka ábyrgd av, uttan at fordøma onnur samstundis.

Tað er ikki synd í teimum, sum hava ábyrgd

Hvussu oftani hava vit ikki hoyrt, at tað er synd í løgmanni ella einum landsstýrismanni, tá atfinningar verða reistar. Og hvat nú, um samgongan rýkur? Nei, siga vit. Lat okkum heldur skelda tey, sum reisa atfinningarnar ella onkran longur niðri í systeminum.

Men hetta er at rætta bakara fyri smið.

Tað er ikki synd í løgmanni ella landsstýrismonnum, um mál verða reist, sum teir hava ábyrgdina av og mugu standa við. Teir hava allar møguleikar at verja seg - um teir bert fáa eitt rímiligt fair-play í fjølmiðlum og frá tinginum. Og um teir tora og vilja grundgeva fyri sínum gerðum í fortíð og nútíð.

Tað er heldur onki galið í, at tingfólk ella onnur reisa atfinningar. Tað er hinvegin teirra skylda. Kravið er bert, at tey, sum atfinningarnar eru reistar ímóti, fáa høvi at svara teimum - og at øll fáa somu viðferð.

Hitt kristiliga muslimalyndið

Nicolina Jensen Beder
Tórshavn 19. sept. 2002

Tá talan er um samkynd, er einki mark fyri, hvussu hin heilaga vreiðin vísir seg. Tá ið tað stendur hvørjum manni frítt at hava egnu meining, skuldi heldur einki verið til hinburs fyri at greitt frá hesum á ein sømiligan hátt. Ikki skuldi verið neyðugt at latið seg í jarnhælar fyri at kleyra á annans kenslur og óynsktu støðu.

Í Trúboðanum kunnu vit lesa: Sambært Bíbliuna so er øll skriftin innblást av Guði, og er hon sostatt óreingjandi, og hetta eigur kirkjan at rætta seg eftir, bæði tá ið orðið gevur ugga, og tá ið tað revsar og lokar millum annað samkynt paralag undir synd. Tað ber als ikki til at signa tað, sum stríður ímóti Guðs orði.

Løgið sum orðið at signa hevur fingið eina merkiliga tulking. Fyrr vóru vit signaði á morgni og á kvøldi, og tá ið prestur var í kirkjuni. Nú er tað vorðið eitt bannorð, tá ið tosað verður um samkynd.

Eg kann ikki siga meg, at vera so frísinnaða, at eg hevði hildið, tað verið rætt, um samkynd skulu í kirkjuna fyri at vígast sum brúðarpar, men hava tey valt at liva saman og koma til altars eins og øll onnur, vildi eg hildið, at tey vóru í sínum fulla rætti til at verða signaði eins og øll hini. Tey munnu vera fá, ið uppfylla tær treytir, ið skriftin áleggur okkum, ið fara til altars.

Tað sær út til, at einki mark er fyri, hvat fólk fáa seg til at skriva í heilagari vreiði. »Fregnir« hevur havt nakrar sera ónærsligar greinir um navngivin fólk, bæði um, hvat ið tey halda, gera og trúgva. Skrivarin ber í bøtuflaka fyri sær sjálvum sigur, at brillurnar eru í ólagi. Eg eri meira bangin fyri, at tað eru eyguni, ið eru farin at bila, tí sum orðatakið sigur: »Ilt eyga skal einki gott sjá«. Um »Fregnir« má eg siga sum fuglfirðingurin: »Eg hevði vænta mær moyra«.

Lítið hevur verið at hoyrt frá teimum, ið stríðið stendst um, onkur hendinga grein, ein einasta í Sosialinum, annars ein góð grein í Dimmu. »Hvor er det skønt at kunne forarges«, somuleiðis ein í Sosialinum »Samkynd: eingin tilburður í ár«. Vit onnur, sum hava fingið bæði í posa og sekk frá skaparans hond, kunnu hóreiggja okkum, sum vit vilja, Við Guðs orði í hendi.

Krúnan á verkinum var tó greinin »Reka føroyingar fyri vág og vind?« Tá ið tosað ella skrivað verður um samkynd, er tað oftast við Bíbliuni í hondini sum ein hóttan. Nú er Bíblian ein sera áhugaverð bók og hartil so fjølbroytt, at ein og hvør, ið vil lýsa egnu hugsan, kann finna eitt ella annað vers, ið vísir, at hugsan hansara er røtt. Tá ið skrivað verður um tey samkyntu, verður so at siga hvørja ferð vístur til 3. Mós, kap. 18 v. 22.

Nú kundi eg hugsa mær at vita, hvussu nógv av hesum hava lisið allan kapittulin, ið er ein vegleiðing um, hvussu vit skulu bera okkum at. Kapittulin telur 30 vers. Í versi nr. 6 stendur: Eingin tykkara má nærkast at holdsligu skyldmonnum sínum til tess at nekta blygd teirra. – Eg eri Harrin – Tað vil siga, at út frá hesum hevur ein pápi ikki loyvi til at fara undir brúsuna saman við soni sínum, ið heldur í svimjihøllina saman við skyldmonnum sínum. So strangliga er tað bannað í Mósubók, at táið Kam, sonur Nóa, av óvart kom at síggja pápa sín nakran, varð hann bannaður av pápa sínum við so harðligum orðum: – »Bølbiðin verði Kánáan! Trælur trælanna verði hann brødrum sínum«.

Í 3. Mós. 18 kap. 22 v. stendur, at maður má ikki hava samlegu við mann eins og við kvinnu. Ein løgin málburður, táið hetta frá náttúrinnar hond ikki letur seg gera. Tað stendur einki í Bíbliuni, hvørt av hesum er verri enn annað. Straffin er fyrst skrivað í vers 29, og er hon tá talandi fyri allan kapittulin. »Tí at hvør, ið fremur nakra av hesum andstygdum – hvør sum fremur tær – skal verða oyddur úr tjóð síni«.

Hetta, eg her havi skrivað, er fyri at vísa á, at ikki er rætt at nýta Bíbliuna sum mannakornsrevsiamboð. Bíblian má lesast sum heild og út frá tíðini hon er skrivað. Um vit trúgva ella góðtaka, at Guð gevur lív og anda, hví munnu tá nøkur kenna seg kallaði til at betra um Guðs skaparverk.

Greinaskrivarin er so mótsigandi sær sjálvum, at eg havi ikki áður lisið slíkt. Samstundis sum víst verður á ymisk skriftstøð sum ástøði undir tí, íð fram verður fort, verður í næstu syftu skrivað: Haldi uppat at róta Bíbliuna og kristindóm uppí! Sigið sum er, at tit venda honum bakið! Aðra staðir verður skrivað. Men vit kunnu ikki bara taka tann partin burtur úr Guðs orði og boðum, sum vit sjálvi ganga inn fyri og blaka restina burtur. Jú men, er hetta ikki júst, tað ið skrivarin ger.

Eitt lítið brot úr hesi longu grein. Hvar eru prestarnir? Hesir professionellu útleggjarar av orðið Guðs, hugsa teir bara um løn og eftirlon hjá sær sjálvum í hesum yvirtøkutíðum. Hvar fór nú tann kristni andin, sum greinin skuldi vísa? Víðari verður skrivað. Einasti andaligi leiðarin, eg veit meg hava sæð alment frammi í málinum um skrásett parlag av samkyndum, er ein danskur prestur í Føroyum, sum ikki sá sær føri fyri at virka sum prestur undir tí leiðslu, sum er í løtuni. At ein prestur velur at fara úr embæti sínum, er einki prógv fyri, at nakað er í vegin við leiðsluni.

Eg havi spurt nógvar prestar, um teir á nakran hátt hava følt seg heftar av tí donsku grundlógini og grein 4 í arbeiði tierra; ikki ein hevur svara ja. Sundurlyndið, ið hóast alt eisini er komið inn um kirkjugátt, stavar helst frá teimum, ið hava útbúgving sína á teim nýggju skúlunum, ið vegna sundurlyndi hava aðra áskoðan.

Aftur til tað, ið greinin snúi seg um. Skulu samkyndum verða tryggjaði borgarlig kor ella ikki? Greinaskrivarin sigur seg vita, at fleiri staðni um landið verður biðið fyri, at røttu avgerðir skulu takast í júst hesum málinum. Spurningurin er so bara, um tað er ein kommandobøn til Guð ella Jesusar egna bøn: »Verði vilji tín«. Sjálv vóni eg, at einhvør rættvís loysn má finnast fyri teimum, ið sjálvi ikki hava biðið um at koma í serklassa.

Hvat sigur danska grundlógin

Álvur Kirke

1. Skulu tey, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni gjalda fyri fólkakirkjuna?

2. Hvørjar skyldur, og hvørji politisk rættindi hava tey, sum hava aðra trúgv enn fólkakirkjunnar?

Avrit av Danmarks riges grundlov
Kapitel VII.

§ 66. Folkekirkens forfatning ordnes ved lov.

§ 67. Borgerne har ret til at forene sig i samfund for at dyrke Gud på den måde, der stemmer med deres overbevisning, dog at intet læres eller foretages, som strider mod sædeligheden eller den offentlige orden.

§ 68. Ingen er pligtig at yde personlige bidrag til nogen anden gudsdyrkelse end den, som er hans egen.

§ 69. De fra folkekirken afvigende trossamfunds forhold ordnes nærmere ved lov.

§ 70. Ingen kan på grund af sin trosbekendelse eller afstamning berøves adgang til den fulde nydelse af borgerlige og politiske rettigheder eller unddrage sig opfyldelsen af nogen almindelig borgerpligt.

Hetta er vert at hugsa um í hesum døgum, tá ætlanin er at yvirtaka fólkakirkjuna, og tá ein landsstýrismaður og tey, hann hevur valt í siðsemisnevndina verða hunddálkað av viðgongdum fólki, - sum helst ikki vita, hvat stendur í donsku grundlógini.